# Tríggjar lítlar barnabøkur

**Heimamissiónsforlagið gevur út tríggjar lítlar barnabøkur**

BØKUR
*Rigmor Dam*
*rigmor@sosialurin.fo*

Heimamissiónsforlagið hevur í jólamánaðinum givið barnabøkur við høvuðsheitum: Tosa við Gud. Bøkurnar eita ávikavist Góði Gud, Takk og Fyrigev. Hetta eru tríggjar smáar pappbøkur, ætlaðar sum hjálp til foreldur at smáum børnum at læra tey at tosa við Gud um tað, tey møta í lívinum. Bøkurnar kosta 25 krónur stykki.






## Verkfrøðingur / byggifrøðingur / arkitektur

Til teknisku deild hjá Fuglafjarðar kommunu er eitt starv sum verkfrøðingur/byggifrøðingur/arkitektur leyst at søkja til setan skjótast gjørligt.

**Arbeiðsuppgávur:**
Uppgávur, sum viðkomandi í høvuðsheitum kann rokna við at skula røkja, eru:

- Útstykkingar
- Nýgerð og umvæling av vegum og kloakkum
- Havnabygging
- Útbygging og viðlíkahald av vatnverki
- Nýgerð og umvæling av kommunalum bygningum
- Byggimálsviðgerð

**Førleikakrøv:**
Søkt verður eftir verkfrøðingi/byggifrøðingi/arkitekti sum sjálvstøðugt kann arbeiða við projektering og eftirliti v.m. innan nevndu virkisøki.

Tekniarbeiði verður gjørt á MicroStation forriti.

Starvið verður lønt sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi fakfelag.

Umsóknir saman við prógvum og upplýsingum um lívsroyndir skulu vera kommununi í hendi í seinasta lagi 10. januar 2006 kl 16.00 á adressuni

Fuglafjarðar kommuna
Tekniska deild
Postboks 30
530 Fuglafjørður

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær Pætur Joensen, býarverkfrøðing, tlf. 444006, lokal 17, e-postur: patur@fuglafjordur.fo

Fuglafjarðar kommuna

# Vit trúgva, og tí tala vit




**"Vit trúgva, og tí tala vit" er fjórða bókin í røðini "Úr kirkju og missiónssøguni". Jóhs. Andr. Næs skrivaði.**

BØKUR
*Rigmor Dam*
*rigmor@sosialurin.fo*

Í hesi bókini fært tú søguna um fyrsta trúboðaran í kirkjuligu vekingarsøgu Føroya, Axel Frederik Moe, sum kom til Vágs 8. november 1904.

Tú fært upplýst, nær tann prestlærdi Axel Frederik Moe varð settur trúboðari, hví hann varð settur, og hvussu tað bar til, at hann varð settur á tann hátt.

Greitt verður frá samanbrestum við aðrar hugsjónir bæði politiskar og andligar.

Víst verður á vanakristindóm, og víst verður á, hvussu summi taka við, og summi vísa frá sær sama gamla gleðiboðskapin.

Tú fært innlit í, hvussu danska kirkjuliga Indre Missión festi fót í Føroyum, og hvussu hon varð grundarlagið undir Kirkjuligu Heimamissiónini, sum vit hava hana okkara millum í kirkjuni í dag.

Bókin kostar 200 krónur, men enn er møguleiki at tekna seg fyri alt verkið og fáa 20 prosent í avsláttri. Hinar bøkurnar í raðnum eru "Varðar á Kirkjugøtuni", "Í Leirum og úr Leirum" og "Har úti á Álakeristrøðnni".